# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*»Eg havi kempað og stríðst til venjing og dyst, og so hati eg at tapa«*

*Jákup á Borg, ársins spælari í Formula-deildini 2006*

# PRIKKURIN YVIR I'IÐ

**Prikkurin yvir i'ið í einum superkappingarári. Soleiðis lýsir Jákup á Borg heiðurin, hann sunnukvøldið fekk handaðan, har ársins leikari hjá kvinnum, Elin Kathrina Haraldsen vera sera bilsin um, at júst hon varð vald at vera besta kvinnan**

ÁRSINS LEIKARAR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*




*Ársins leikarar hjá kvinnum og monnum, Elin Kathrina Haraldsen úr AB og Jákup á Borg frá HB*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Nú gaggurnar eru settar á hillina fyri veturin, kann Jákup á Borg líta aftur á eitt rimmar kappingarár. Eitt kappingarár, har leiðsla felagsins frammanundan hevði boðað frá, at unga HB-liðið fyrst og fremst skuldi byggjast upp av nýggjum, áðrenn krøv um meistaraheitið kundu setast.

Úrslitini vóru eisini svingandi at byrja við, men so við og við funnu ungu leikararnir stevi og á allar seinasta leikdegi gjørdist greitt, at stevið hevði verið so gott og trygt, at teir endaðu fremstir í deildini.

Men hóast til tíðir svingandi avrik hjá liðnum, so var tað altíð ein, sum helt eitt javnt og høgt støði hjá HB. Tað var Jákup á Borg og eigur hann stóran lut í meistaraheitinum hjá høvuðsstaðarfelagnum í ár. Hóast hann bert er 27 ára gamal, so telist hann millum royndu menninar hjá HB, og hann vísti eisini vegin fyri ungu liðfeløgum sínum gjøgnum kappingarárið.

– Hetta kennist øgiliga gott. Prikkurin yvir i'ið eftir eitt super-kappingarár. Men heiðurin, eg nú havi fingið, er nakað, sum liðið hevur uppiborið, og eg hevði ongantíð staðið her uttan at eg hevði liðfelagar, sum dugdu og sum tímdu at spæla meg, sigur Jákup á Borg, sum eisini sendir venjaranum eina heilsu á vegnum.

### Fyrstu ferð

Jákup á Borg hevur í mong ár talst millum frægastu leikararnir í føroysku landskappingini, og hóast hann tvær ferðir áður hevur fingið gyltu gagguna, fyri at hava skotið flest mál í deildini, so hevur hann ongantíð áður fingið heitið "ársins leikari".

– Aftur har má eg takka venjaranum og liðfeløgunum. Eg havi kempað og stríðst til venjing og dyst, og so hati eg at tapa. Vit hava spælt álopsfótbólt, tað er tað, sum mær dámar, og so havi eg havt ein frían leiklut í høgra borði og tað hevur gingið væl, staðfestir Jákup á Borg.

### Øgiliga bilsin

Tey eru mong, ið hava víst á, at sjálvandi skuldi Jákup á Borg verða ársins leikari hjá monnum. Men var valið í mansdeildini lætt, so var tað ikki heilt so lætt í kvinnudeildini.

Í síðsta enda vóru tó størst semja um, at Elin Kathrina Haraldsen hjá AB hevði heiðurin uppbornan.

– Eg eri øgiliga bilsin av hesum, tí hetta hevði eg ongantíð roknað við. Skal eg so finna eina beinleiðis orsøk, so má tað vera venjarin, sigur Elin Kathrina Haraldsen.

Hon heldur eisini, at liðið eigur sín part av heiðrinum, hon nú hevur fingið.

– Liðið hevur virkað væl í ár, og ein spælari er ongantíð góður einsamallur, staðfestir ársins leikari hjá kvinnum 2006, Elin Katrina Haraldsen.

# Ársins stjørnuskot við 28 málum

Tað var ein sjónliga bilsin Hanna Isaksen, sum stóð við favninum fullum av heiðurslønum sunnukvøldið. Hon vísti framman undan, at hon fór at fáa gyltu gagguna fyri at hava skotið flest mál í deildini, men at verða vald ársins stjørnuskot eisini, hevði Hanna Isaksen ikki roknað við.

Men tá hugt verður aftur á kappingarárið, so kemst ikki uttan um, at árið hevur riggað væl hjá ungu toftadamuni í gula GÍ-búnanum. 28 ferðir rakti hon málið – einaferð meiri enn Rannvá Andreasen hjá KÍ – og tí var hon eisini mest upplagda boðið til ársins stjørnuskot.

– Eg veit ikki hvussu hetta ber til, flenti Hanna Isaksen, tá hon verður spurd eftir, hvussu tað ber til, at árið hevur riggað so væl hjá henni.

– Eg havi roynt at møtt til hvørja venjing, og nakað av venjing heima havi eg eisini gjørt. Liðfelagarnir hava eisini verið ein góð hjálp og ein hollur stuðul, sigur ársins stjørnuskot 2006, Hanna Isaksen.

**-rwd**



*Hanna Isaksen gjørdi eitt ordans hál sunnukvøldið. Umframt gylta skógvin sum besti málskjútti, varð hon eisini kosin ársins stjørnuskot*

*Mynd: Álvur Haraldsen*